# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2008 | BLAÐ NR. 25 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Tryggast við fastari flyting

Allir limir, sum ikki eru í eftirstøðu við limagjaldi, eru lívstryggjaðir.
Lívstryggingin er ein umfatandi trygging. Sum dømi kunnu vit her nevna:

- Útgjald við deyða til avvarðandi.
- Útgjald, tá limur gerst 67 ár.
- Útgjald til eina langa røð av hættisligum sjúkum.

**Tá børn hjá limi gerast sjúk**
Lívstryggingin er eisini galdandi fyri børn hjá limi; tó við teirri avmarking, at tey skulu vera ímillum 6 mánaðir og 18 ára gomul.
Tá børn hjá limi gerast sjúk fevnir tryggingin um hesar sjúkur:

- Eykvæmi, HIV-ígerð av blóðflutningi,
- Nýrasvignab,
- Meningitis,
- Illkynjaðar krabbameinssjúkur,
- Blindni (aldursavmarking: ár >2 og <18)
- Deyvleiki (aldursavmarking: ár >2 og <18)

**Umfatandi lívstrygging**
Av tí at lívstryggingin er so umfatandi fáa vit ikki nevnt alt her. Men limir kunnu altíð venda sær til skrivstovu felagsins, og fáa ein faldara sendan við nágreiniligari frágreiðing um allar smálutir í lívstryggingini.

Av tí, at tryggingin ikki er galdandi, tá limur er í eftirstøðu, kann hetta fáa sera óhepnar fylgjur.

Tí heita vit á teir limir, sum enn ikki hava stovnað eina sjálvvirkandi flyting, um at fáa tað gjørt. Hetta kann gerast á hendan hátt: Næstu ferð tygum móttaka rokning fyri mánaðargjald, skulu tygum undirskriva rokningina, lata hana til tygara peningastovn, sum síðani syrgir fyri, at rokningin verður goldin og, at tygum verða tilmeldaður sjálvvirkandi flyting. Lætt og einfalt. Lívstryggingin er partur av limagjaldinum, sum er 450,- kr. um mánaðin. Limirnir eru sjálvandi altíð vælkomnir at venda sær til skrivstovuna í hesum sambandi.

## Innihald


| | |
|---|---|
| Ársfrágreiðingin 2007 | 3 |
| Eftirlønargrunnurin | 7 |
| Skúladepilin – ein tungur burður | 11 |
| Kraftsentur hjá ungdóminum | 15 |
| Skúlarnir eiga at varðveita kjarnuvirksemið | 18 |
| Heimleys vitan | 24 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Sjúrðargøta 20 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 • Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

Eli Brimsvík formaður Havnar Handverkarafelags:

# Ársfrágreiðingin 2007

Ársaðalfundur felagsins, sum varð hildin 12. mars í ár var nr. 58 í røðini síðani felagið var stovnað í 1950.

Fyri felagið var árið 2007 hendingaríkt á mongum økjum og gav okkum stórar avbjóðingar. Fyrst eigur at vera nevnt, at vit vóru til sáttmálasamráðingar bæði við Meistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.



Samanumtikið meta vit at samráðingarnar gingu rímiliga væl. Vit høvdu 5 fundir við Meistarafelagið áðrenn vit komu ásamt um nýggjan sáttmála. Sáttmálasamráðingarnar við Fíggjarmálaráðið gingu væl; við teir høvdu vit 3 fundir áðrenn vit komu á mál.

## Stutt um sáttmálarnar

Samanlagt fingu vit rímiliga væl burturúr sáttmálasamráðingunum, tó at vit altíð kundu ynskt okkum meira. Samlaði lønarkarmurin var 9.75 %, men við ymiskum broytingum inni í sáttmálanum er samlaða %-talið væl meira.

Tá sáttmálaskeiðið er lokið er arbeiðsgevaraparturin til eftirlønina komin uppá 13%. Og við teimum tveimum prosentunum, sum vit sjálvir gjalda koma vit uppá 15%, so nú byrjar at líkjast. Í løtuni fáa lærlingar 5.5% í eftirløn, og fyri teir er galdandi sama prosent hækking sum fyri sveinar. Men meistararnir eru sinnaðir – uppá sikt – at hakka % talið hjá lærlingunum soleiðis, at teir koma upp á sama støði sum sveinar.

## Skúladepilin í Marknagili

Í mong ár hevur verið arbeitt fyri at fáa bygt nýggjan tekniskan skúla í Havn.

Her eigur at vera nevnt, at samgongan, sum sat áðrenn seinasta løgtingsval ætlaði at byggja ein skúladepil í Marknagili, sum skuldi hýsa Handilsskúlanum og Tekniska skúla.

Henda ætlan var komin so mikið væl áleiðis, at ein verklagslóg var um at vera klár, og tí var eisini ein ítøkilig projektering til hesar báðar skúlarnar í ljósmála.

Men eftir løgtingsvalið – fyrst í hesum árinum – fekk pípan kortini eitt annað ljóð.

Nýggja samgongan, sum var skipað eftir løgtingsvalið, vildi hava nýggjan Studentaskúla inn í skúladepilin í Marknagili, og kravdi, at fyrst og fremst skuldi farast undir at byggja tann partin av deplinum, sum skal hýsa studentaskúlanum. Og ikki fyrr enn hesin parturin av deplinum er liðugur skal farast undir at byggja partarnar til Handilsskúlan og Tekniska skúla.

Sjálvandi kann ein og hvør siga sær sjálvum, at hetta fer at seinka bygginini av nýggjum Tekniskum skúla, og tí mótmælti stýrið fyri Tekniska Skúla í Tórshavn eisini harðliga hesi mannagongd.

## Tríggir skúlar í einum stýri

Í løtuni er mangt, sum bendir á, at ovasta leiðslan fyri skúladepilin verður samansett av umboðum fyri teir tríggjar skúlarnar, sum depilin skal hýsa.

Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at ein greiður meiriluti í stýrinum fyri Tekniska Skúla er ímóti hesi samanlegging, men tað er mangt sum bendir á, at vit verða noydd at góðtaka kravið frá Mentamálaráðnum.

Mentamálaráði hevur boðað frá, at ganga vit ikki undir teirra treytir, so kann peningaliga játtanin takast frá skúlanum.

Hetta kann tykjast marghøttligt, tá hugsað verður um, at Tekniski Skúli eigur økið, sum ætlanin er at byggja skúladepilin á, og tí er ikki lætt hjá okkum at góðtaka, at ein annar skúli verður raðfestur framum Tekniska Skúla. Fleiri fundir hava í seinastuni verið ímillum stýrið fyri Tekniska Skúla og Mentamálaráðið, men enn fyriliggur kortini einki ítøkiligt. Tað er kortini okkara vón, at vit koma til eina semju, soleiðis, at vit kunna fáa ein nýggjan tekniskan skúla í Havn um ikki ov langa tíð.





Men tað er mangt, sum bendir á, at Tekniski Skúli í Tórshavn – sum sjálvsognarstovnur – er um at fara í søguna.

## Felagshúsið í Stoffalág

Húsini, sum Havnar Handverkarafelag eigur í Stoffalág, hava seinastu mongu árini verið leigað út til Tórshavnar kommunu. Felagið hevur sagt leigumálið við kommununa upp, og ætlanin er at flyta skrivstovu felagsins úr ognini í Sjúrðargøtu niðan í Stoffalág.

Vit roknað við, at vit kunnu flyta niðan í Stoffalág í heyst, og tað gleða vit okkum til. Tá verða heilt aðrar umstøður at arbeiða undir. Ætlanin er m.a. at skipa fyri sosialum tiltøkum fyri limir, og kanska okkurt skeiðsvirksemi eisini.

Ætlanin er eisini at seta ognina í Sjúrðargøtu í góðan stand, soleiðis at hon kann leigast út til skrivstovu ella líknandi. Fáa vit rætta prísin fyri húsini í Sjúrðargøtu kann tað sjálvandi koma uppá tal at selja.

## Sáttmálaøki

Sum mong vita, tók stríð seg upp viðvíkjandi portørunum og ambulansustarvsfólkunum innan sjúkrahúsverkið. Upprunin var sambært Havnar Arbeiðsmannafelag tann, at Starvsmannafelagið hevði tosað við onkrar portørar, fyri at lokka teir yvir um.

Veruleikin er tann, at hetta sáttmálaøki hevur hoyrt til Havnar Arbeiðsmannafelag síðani einaferð fyrst í trýssunum, og tað vildi felagið sjálvandi halda fast um. Samanum kann

sigast, at tað er stórt spell, at Starvsmannafelagið enn einaferð roynir at ota seg inn á onnur sáttmálaøki. Hetta er óheppið, tí tað skapar spjaðing í fakfelagsrørsluni.

## Samtak

Vit hava verið á fundi við Samtak, fyri at vita hvat tað gongur út uppá, men enn er ikki tikin nøkur avgerð um vit skula fara uppí. Tað er nokk eingin ivi um, at jú fleiri vit eru, jú sterkari standa vit. Í fyrstu atløgu meta vit kortini, at rættast er at fáa savna øll handverkarafeløgini í Føroyum í eitt felag. Og nógv bendir á, at tað kann koma uppá pláss um ikki so langa tíð.

## Tryggingarfelagið Alka

Allir limir í Havnar Handverkarafelag eru tryggjaðir hjá danska tryggingarfelagnum ALKA. Her kunnu vit nevna, at í 2007 vórðu umleið 1,7 mió. kr. goldnar í tryggingargjaldi til Alka. Hinvegin var útgjaldið hjá Alka umleið 1,3 mió. kr. Her eigur at vera sagt, at vit samanlagt eru stak væl nøgd við samstarvið við tryggingarfelagið ALKA.

## Fulltíðar formansstarv

Nevndin í felagnum gjørdi á vári 2007 av, at formaður felagsins skuldi vera heiltíðarsettur. Nevndin heitti á meg um at umhugsa støðuna hesum viðvíkjandi. Eg umhugsaði tað gjølla saman við familjuni í eina tíð, og gjørdi síðani av í samráð við nevndina at siga upp mítt starv á Skipasmiðjuni, og havi eg verið í fulltíðarstarvi síðani 1. juli 2007. Hetta var hildið at vera neyðugt av tí, at virksemi felagsins er nógv økt og økist framvegis. Tí metti nevndin, at hetta var eitt neyðugt stig at taka bæði fyri felag og limir.



## Heimasíðan

Sum mong helst hava lagt til merkis, er heimasíða felagsins gjørd av nýggjum.

Vit halda at hon nú er meiri brúkaravinarlig, og inniheldur fleiri upplýsingar um felagið, sáttmálar og annað. Men tað er ynskiligt, at limirnir koma við hugskotum um heimasíðuna, soleiðis at hon gerst enn betur, og eru møguleikar gjørdir fyri hesum. Vit hava lagt til merkis, at heimasíðan er væl vitjað – eisini av fólki í øðrum londum sum t.d. Danmark, Svøríki, Ísland, Póland, Ongland, Ný Sæland, Serbia, Noregi og USA. Tað er onki at ivast í, at hesi fólk koma inn á okkara heimasíðu, tí tey leita eftir upplýsingum um Føroyar og føroyska arbeiðsmarknaðin. Hetta prógvar helst, at eisini vit – eru við í nógv umrøddu altjóðagerðini.

## Broytt rentutryggingarlóg

Av tí, at tað hevur týdning fyri limirnar fara vit her at nevna, at Toll & Skatt hevur broytt reglurnar um kapitaluppsparingar, soleiðis at skilja, at hægsta mark fyri skattafríum inngjaldi er føst upphædd.

## Útlendsk arbeiðsmegi

Vit hava í sambandi við ætlanina um, at lata arbeiðsmarknaðin upp fyri útlendskari arbeiðsmegi, verið á fundi við feløg í Íslandi og Danmark, fyri at finna útav hvørjar trupulleikar teir hava havt av útlendskari arbeiðsmegi. Niðurstøðan hjá øllum var, at um vit ikki fingu hesi fólk inn í fakfeløg, var ógvuliga ringt at fylgja við um tey nú fingu tað tey áttu sam-



bært sáttmála. Í fleiri førum hava hesi fólk verið undirbetalt, og verið noydd at gera svart arbeiði fyri at yvirliva, so eitt minstakrav frá fakfeløgunum er tí, at tað verður undir skipaðum viðurskiftum. Danskarar, og eisini onnur lond, gera nógv fyri at upplýsa útlendingum um fakfeløgini, hvat fakfeløgini hava at bjóða, og ikki minst, hvat tey kunna missa, tá tey standa uttanfyri fakfelag.

Til dømis hava tey fingið sáttmálar og eisini heimasíður umsettar til enskt, polskt og onnur tungumál soleiðis, at tey sjálvi kunna lesa tað. Vit meta eisini, at hetta er rætta leiðin at ganga.

## Thor Alpha

Sum flestu handverkarar vita, gjørdi Landsfelag Handverkaranna eina avtalu við Tórshavnar Skipasmiðju um bygging av veitingarskipum til oljuvinnuna. Tað vóru ymiskar meiningar um hesa avtalu, sum á ein hátt var ímóti streyminum, men vit vóru sannførdir um, at gjørdu vit ikki hesa avtalu, so vildi tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn alt arbeiði innan nýbygging var gjørt í útlandinum. Og so var vandi fyri, at alt, sum eitur skipasmíð var liðugt her í Føroyum. Út frá tí gjørdu vit eina 4 ára avtalu við eina pólska skipasmiðja. Teir høvdu nokk av fólki, men teir høvdu ikki pláss at byggja á. Tí kundu teir lata sínar sveisarar koma til Føroyar at byggja skrokkarnar. Alt annað arbeiði gera føroyskir handverkarar.

Nú fyrsta skipið, sum er bygt eftir hesum leisti, er latið eigarunum kunna vit staðfesta, at hetta var ein góð avtala fyri føroyskar handverkarar, og ikki minst fyri bygdasamfelagið við Skálafjørðin. Alt í alt kunna vit bara vera stoltir av hesi avtalu við skipasmiðjuna. Møguleikar eru sjálvandi fyri at leingja avtaluna um umstøðurnar tala fyri tíð.

## Útistandandi limagjald

Eins og vit hava nevnt áður er framvegis ávís eftirstøða av limagjaldi. Hetta hóast vit gera eitt miðvíst arbeiði fyri at fáa hesi gjøld goldin. Lat tað vera nevnt her, at í allar flestu førum hevur tað eydnast. Tað er sjálvandi eisini møguligt at gera serligar gjaldsavtalur við felagið um tað er neyðugt.

Vit meta kortini, at tað er óheppið at felagið skal brúka so stóra orku til innkrevjing av gomlum limagjaldi. Í hesum sambandi hevur verið nevnt, at fyri at sleppa undan slíkum trupulleikum, kundi limagjaldið verið sett upp hjá teimum, sum ikki hava fasta flyting. Vit hava varhugan av, at tað helst er har trupulleikin liggur.



Sofus Joensen: Formansfrágreiðing fyri 2007

# Um eftirlønargrunnin

12. mars 2008 var aðalfundur í Eftirlønargrunninum. Á aðalfundinum legði formaðurin í Eftirlønargrunninum, Sofus Joensen, fram ársfrágreiðing fyri virki grunsins í 2007.

Á aðalfundinum stóðu tveir nevndarlimir fyri vali, Bjarni Pétursson og Kristian Eli Brimsvík. Teir vóru báðir afturvaldir at sita í eitt tvey ára skeið.



Eftirlønin hjá okkum er nú komin upp á 12% bæði á tí privata, og á tí almenna arbeiðsmarknaðinum. Tá verandi sáttmálaskeið er runnið í 2010 eru vit komin upp á tey 15%, sum vit settu okkum sum mál fyri ikki so nógvum árum síðani.

Tað vil eisini siga, at í 2010 skulu vit aftur taka støðu til um tað skal liggja á teimum 15%, ella nakað hægri. Góðar stundir eru til at umhugsa og kjakast um henda spurning.

## Renta og bankar

Sum vit vita, so var innlánsrentan í bankum í 2007 rættiliga lág og er tað framvegis. Tí hevur tað eisini verið trupult í 2007 at fáa stórvegis avkast av innistandandi peningi í banka.

Og tað er mangt, sum bendur á, at innlánsrentan framhaldandi verður lág, eisini eina tíð framyvir.

Í hesum sambandi eigur eisini at vera nevnt, at mark eisini er fyri, hvussu tryggur peningur innistandandi í banka er. Fer banki t.d. á húsagang, sum ikki er heilt ókent um okkara leiðir, tá er einans trygd fyri 350.000,- kr. Og skuldi tað hent, so er vandi fyri at missa alt, sum liggur omanfyri 350.000,- kr.

## Sveiggj upp og niður

Í 2007 vóru eisini stór sveiggj upp og niður á peningamarknaðinum. Hetta komst m.a. av rembingunum, sum koma í kjalarvørrinum av, at íløgufeløg, og fíggingarstovnar mugu avskriva pening, tá teir missa pening upp á ivasamar íløgur. Tá talan er um íløgur kann tað vera freistandi at seta peningin har, sum hann sær út til at geva mest. Men vit skulu samstundis eisini minnast til, at har, sum tær størstu inntøkurnar eru, er so at siga altíð tann størsti vágin, og størsti vandin fyri at missa pening. Vit sum vara av Eftirlønargrunninum meta tað at vera okkara skyldu altíð at vera varin, tá ið vit plasera pening hjá Eftirlønargrunninum. Lat tað tó eisini vera sagt, at tað sjálvandi altíð er nógv hugaligari at leggja fram

ein roknskap við stórum vinningi í mun til ein roknskap, sum av varsemi er meira soltin.

## Subprime trupulleikar

Í seinastuni hava fjølmiðlarnir umrøtt tey sonevndu *Subprime lánini* og avleiðingarnar av teimum – serliga í USA. Sum vit vita, so er ein djúptgangandi samanhangur í fíggjarheiminum um allan knøttin. Tí kann tað eisini fáa álvarsamar avleiðingar fyri peningamarknaðin í Evropa, tá trupulleikar t.d. eru á fíggjarmarknaðinum í USA. Nú eru nøkur ár síðan tey sokallaðu Subprime lánini blivu sera væl umtókt í USA. Hesi lán vístu seg – í fyrstu atløgu - at vera ein rættiliga góð íløga, og avkastið vísti seg eisini at verða rættiliga gott. Tí vóru tað eisini nógv, sum hoppaðu upp á hendan vognin. Hesar íløgur hava tó seinni víst seg ikki at geva tað avkast, ið væntað varð.

Og fyri nøkrum mánaðum síðani kom í ljósmála, at tað stutt sagt ikki var dekningur fyri hesum slagi av lánum, ella sagt við øðrum orðum, at hetta var ein vánalig íløga. Av tí at peningamarknaðurin – um allan knøttin – hevur sínámillum avleiðingar breiddi hesin trupulleikin seg eisini til Evropa.

Hetta verður nevnt her fyri at vísa á, at tað er neyðugt at vera sera varin, tá ið peningur verður plaseraður.

Í vár var húsamarknaðurin í USA um at kollsigla og tapini gjørdust ovurhonds stór hjá mongum. Men hetta kann ikki fáa ávirkan á





okkum, tað hava vit fullgóð prógv fyri.

## Ivasamar íløgur

Lat meg beinan vegin gera tykkum greitt, at okkara Eftirlønargrunnur ongantíð er farin inn í ivasamar íløgur, tað kundi verið freistandi, tí vinningurin kann gerast ovurhonds stórur, og her tosað vit ikki um smávegis peningaupphæddir.

Vit hava altíð verið varin við íløgum hjá Eftirlønargrunninum, tí tað er peningur, sum skal koma okkum øllum til góðar, tá ið vit einaferð koma har til, at vit skulu hava eftirløn útgoldna. Vit mugu eisini minna á, at her er talan um, at vit umsita pening, sum er ogn hjá øllum limunum, – tí er neyðugt við serligum varsemi. Lat okkum her eisini nevna, at bæði grannskoðari og Tryggingareftirlitið fylgja væl við gongdini í grunninum. Hetta borgar fyri, at alt er so trygt, sum til ber, og vit kunnu siga, at hjá okkum er trygdin ovast á listanum.

## Íløgur og tubbak

Fyri nøkrum vikum síðani kom undan kavi, at fleiri eftirlønargrunnar og íløgufeløg hava gjørt íløgur í tubbaks- og vápnaídnaðin, og at tá er talan um "ikki" etiskar íløgur. Tá hetta kom fram kannaðu vit – alt fyri eitt – allar okkara íløgur. Tá talan er um tubbaksídnaðin er lætt

at gera eina slíka kanning, og tað var eisini skjótt greitt, at okkara íløgur ikki hava samband við tubbaksmarknaðin.

Men – tá talan er um vápnamarknaðin og vápnaídnaðin er støðan ein heilt onnur, tá er ikki líka lætt at koma til somu niðurstøðu. Hetta kemst av, at í vanliga ídnaðinum kunnu fleiri smáir veitarar gera avtalur sínámillum. Og talan kann t.d. vera um stórar fyritøkur, sum gera avtalur við ein hóp av smærri fyritøkum. Her kunnu smáar fyritøkur, sum vit ikki kenna koma inn í myndina, t.d. handverkarafyritøkur, sum framleiða skrúvur, boltar, møtrikkar og aðrar smálutir umvegis aðrar fyritøkur.

Talan kann eisini vera um verksmiðjur, sum gera motorar til vanlig flogfør, sum tó eisini kunnu setast í hernaðarflogfør ella flogfør, sum lutvíst hava samband við verjuna í einum landi, sum vit onki vita um.

Men lat tað vera sagt her, at allar okkara kanningar vísa, at vit ikki eru við í íløgum, sum hava beinleiðis samband við tubbaks- ella vápnaídnað.

## Løgtingið

Mangt bendir á, at um ikki so langa tíð, fer politiski myndugleikin, Føroya Løgting, at samtykkja eina lóggávu, ið hevur til endamáls, at øll, sum hava inntøku í Føroyum, skulu gjalda í minsta lagi 15% inn í eina ella aðra eftirlønarskipan. Í hesum sambandi er tað ein tryggleiki, at vit longu hava skipaði viðurskifti á økinum, við einum fyrimyndarligum eftirlønargrunni og góðum sáttmálum á økinum. Tað er onki at ivast í, at hann verður góðkendur og kann lúka øll krøv, sum tá verða sett. Her eiga vit at nevna, at vit tá helst vera langt frammanfyri støðuna hjá mongum øðrum føroyskum fakfeløgum, sum tá verða noydd at leggja alla orku í at fáa greið viðurskifti á hesum øki, og tí kanska ikki fáa møguleika til at taka sær av øðrum viðurskiftum, sum fakfeløg eiga at taka sær av. Tá verða vit í eini góðari støðu í mun til mong onnur fakfeløg.

## Vit eiga tann besta grunnin

Lat tað eisini verða sagt, at vit frá mongum síðum hava fingið at vita, at vit eiga nógv tann besta eftirlønargrunnin á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Onkur hevur enntá sagt, at ein eftirlønargrunnur kann ikki vera betur enn okkara, og er tí eisini tann besti í heiminum. Tað kunnu vit vera stolt av.

Raksturin av einum eftirlønargrunni kann ikki vera betur enn okkara, snøgt sagt tí, at umsitingin er so effektiv og einans kostar 5% av inngjøldunum.

Eitt annað, sum vert er at nevna í hesum sambandi er, at grunnurin er fult tryggjaður, tá ið talan er um arv, t.v.s. at innistandandi hjá limunum arvast á jøvnum føti við allar aðrar ognir, tá talan er um arv.

## Fóru til verka 1. januar 2008

Tá okkara eftirlønargrunnur varð stovnaður varð avtalað, at hann tey fyrstu árini skuldi konsuliderast og, at hann 1. januar 2008 skuldi fara undir allar útgjaldingar, sum liggja í viðtøkunum fyri grunnin.

Vert er at nevna eina broyting, sum er hend síðan grunnurin varð stovnaður.

Her verður hugsað um, at í 2007 broytti Landsstýri setanartreytirnar hjá fólki í almennum starvi soleiðis, at tey kundu vera í starvi til tey gjørdust 70 ára gomul. Frammanundan var talan um 67 ár.

Hetta hevur við sær, at starvsaldurin fer úr 67 upp í 70 ár. Í hesum sambandi hevur Gjaldstovan eisini álagt okkum at uppgeva, hvussu nógv hvør einstakur limur hevur goldið inn í eftirlønargrunnin. Og sum vit vita, so kann eingin spara upp meira enn eitt ávíst krónutal um árið, sum kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Hendan upphædd verður ásett fyri eitt ár í senn.



## 10 ára starvsaldur

Eitt annað mál, sum vit hava arbeitt við, er at finna fram til, hvør eigur upp til 10 ára starvsaldur. Tá eftirlønargrunnurin varð stovnaður setti Havnar Handverkarafelag 5 mió. í eftirlønargrunnin sum stovnsfæ. Hetta var krav frá Tryggingareftirlitinum. Hesin peningur skuldi seinni brúkast til limir í Havnar Handverkarafelag. Ein spurningur hevur tí verið, hvussu nógv og hvør, skuldi fáa part av hesum peningi. Saman við aktuari grunsins hava vit gjørt eina so rættvísa skipan sum til ber. Hon gongur í stuttum út uppá, at goldið verður út í mun til, hvussu leingi - teir ella tær - hava verið limir í Havnar Handverkarafelag. Neyvar útrokningar vísa, at hetta kemur at kosta grunninum knappar 8 mió. kr. Hesin peningur verður tikin av yvirskotinum av undanfarnum árum.

Hvussu verður við peninginum, sum Havnar Handverkarafelag setti í grunnin sum stovnsfæ er eingin loysn funnin á enn. Hetta nýtast vit tó ikki at taka støðu til fyrr enn 2015.

## Ábyrgd

Lat meg eisini her nevna, at tað er umráðandi, at limirnir sjálvir ansa eftir, at allar útgjaldingar eru, sum ásett í sáttmálanum. Her hugsi eg um at kanna um arbeiðsgevarin flytur tað hann sambært sáttmálan eigur at flyta, og at kannað um øll eftirlønin verður flutt til eftirlønargrunnin. Sjálvandi kanna skrivstovufólk okkara tað, sum tey kunnu kanna, men har kann okkurt fara framvið uttan, at tey fanga tað.

Vit eiga ikki at gloyma, at nú er eftirlønin vorðin ein stórur partur av lønini og, tí er umráðandi, at eisini limirnir kenna sína ábyrgd í hesum sambandi.

Lat okkum at enda nevna, at vit hava heitt á Dátueftirlitið um at kanna trygdina hjá Eftirlønargrunninum. Tað er gjørt, og vit hava fingið váttað, at allar skipanir eru tryggar og góðkendar.

Egon Øregaard: Skúlastjóri á Tekniska Skúlanum í Tórshavn:

# Skúladepilin – ein tungur burður

12. mai 2003 fekk Tekniski Skúlin í Tórshavn, Føroya Handilsskúli og Føroya Studentaskúli skriv frá Mentamálaráðnum, við fylgjandi yvirskrift:

**"Tilnevning og arbeiðssetningur fyri bygginevnd at stíla fyri bygging av skúladepli í Marknagili".**



Fólk vóru fegin um, at loksins hendi nakað við bygging av hóskandi hølum til hesar tríggjar skúlarnar.

Arbeitt var við ídni fram til 28. nov. 2003, tá álitið varð lagt fyri Anitu á Fríðriksmørk, landsstýriskvinnu.

Sum kunnugt kom stígur í byggimálið, og onki frambrot hendi tey fylgjandi trý árini.

## 21. desember 2006

Men 21. desember 2006 fekk Tekniski Skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli skriv frá Mentamálaráðnum, við fylgjandi yvirskrift: **"Viðvíkjandi bygging av Miðnámsskúla við Marnagil:**

Fólk vóru glað um, at aftur sást ljós við endan av tunlinum og, at tað loksins fór at eydnast at fáa Tekniska Skúlanum í Tórshavn manssømiligar umstøður til undirvísingarvirksemi fyri lærlingar og aðrar næmingar innan tøkniliga økið.

Byggistýrið, projektleiðsla, bygginevnd og flestu starvsfólkini á Tekniska Skúlanum í Tórshavn og Føroya Handilsskúla, fóru við eldhuga undir hesa spennandi verkætlanina.

## 21. desember 2007

Eitt ár seinni, 21. desember 2007, varð byggiskráin fyri Miðnámsskúlan við Marknagil (Tekniski Skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli) løgd fyri Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann.

Sambært hesu byggiskrá er samlaði byggikostnaðurin 286 mió. kr. (uttan innbúgv og útgerð). Samlaði fermetratørvurin er uml. 13.600.



## 6. mars 2008

Tann 6. mars 2008 fær Tekniski Skúlin í Tórshavn, Føroya Handilsskúli og Føroya Studentaskúli teldupost frá Mentamálaráðnum, har heitt verður á skúlarnar um at gera viðmerkingar til

**"uppskot til løgtingslóg um at byggja miðnámsskúladepil í Marknagili"**

Stýrið, leiðslan og flestu starvsfólkini á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, hava frá byrjan av tikið fult undir við, at TST gerst partur í einum Skúladepli, har Føroya Handilsskúli og Føroya Studentaskúli eru hinir partarnir í deplinum.

## Væl nøgdur við depilin

Persónliga taki eg fult undir við Skúladepilshugtakinum og havi frá byrjan sæð stórar møguleikar við einum Skúladepli.

Skúladepilin kemur at skapa bestu fortreytir fyri, at okkara ungu fáa eina góða og viðkomandi útbúgving í Føroyum og, at teirra náttúrligi áhugi verður vaktur á fleiri økjum. Skúladepilin kemur eisini at geva teimum lesandi ein "farra" av, hvussu eitt nútíðar undirvísingarumhvørvi er, eisini í okkara grannalondum.

## Fólksligur mentanardepil

Sjálvur síggi eg møguleikar fyri, at Skúladepilin gerst ein fólksligur "Mentanardepil". Hugsanir hava verið frammi um, at eitt nú Føroya Musikkskúli eisini gjørdist partur í Skúladeplinum. Um Føroya Musikkskúli var partur í deplinum, var ein tónleikahøll gjørd til framførðslur. Tað var tá ein sjálvfylgja at samstarv var gjørt millum Føroya Studentaskúla og Musikkskúlan á hesum økinum, baði tónleikaliga og listarliga. Somuleiðis kundi hetta skapt fortreytir fyri, at onnur tónleikatiltøk fara fram í Skúladeplinum.

Verður hugsað um framførðslupartin er nærliggjandi, at næmingar á Tekniska Skúlanum í Tórshavn vóru við í hesum arbeiði, – næmingar innan el (ljós), stíl og snið (dekoratión), snikkarar/húsasmiðir (pallur) o.s.fr.

## Miðla- og bókasavn

Eisini hava møguleikarnir fyri, at Tórshavnar kommuna á øðrum økjum gerst virkin partur í skúladeplinum t.d. við, at Býarbókasavnið gerst partur í miðlasavninum í Skúladeplinum.

Eftir mínum tykki er tað einans hugflogið, ið setir mørkini.

Vit eiga í einum so stórum skúlaumhvørvi at gera okkum greitt, at vandi kann verða fyri, at næmingar missa seg sjálvan burtur í einum so stórum umhvørvi.

Eisini er neyðugt at seta fakligt "fokus" á útbúgvingarnar. Sæð í mun til støddina er neyðugt í enn størri mun at seta hvønn einstakan næming í miðjuna.

## Menning av útbúgvingum

Hinvegin eiga vit at síggja stóru møguleikarnar, sum eru fyri, at útbúgvingarnar á teimum ymisku skúlunum sleppa at menna seg uttan, at fordómar seta mørk fyri nýggjum møguleikum, teimum ungu og føroyska samfelagnum at gagni.


FRÆLSI
GOYM FRÆLSI
SAYNA KEYLUR
kall
GOYM FRÆLSI
TÍTT GJALDOYRA
SENDISTOVAN
Hvør keyla hevur virði á 15 kr. og kann nýtast sum gjaldoyra á hesum støðum:
Kall handilin í SMS
Kall handilin á Óðinshædd
Kall handilin í Saltangará
Kall handilin í Klaksvík
City
Expert
Burger King
Williams
Sunset Boulevard
Pizza 67 í Tórshavn
Pizza 67 í Klaksvík
Trend Floor í Saltangará
Rafik'sa í Saltangará
J.A.P í Klaksvík
Fyri 5 keylur fært tú
eitt ókeypis atgongumerki til biografin
Fyri 6 keylur fært tú
ein ókeypis bowlingtíma
Tilboðið er galdandi til 1. juni 2008
kall
20 20 20



sansir.fo

# Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Málarameistararnir
# FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny



Mikkjal Helmsdal: Rektari í Hoydølum

# Kraftsentur hjá ungdóminum

**Fremsta málið hjá mær sum rektari í Føroya Studentaskúla og HF-skeiði er, at skúlin fær góðar og tíðarhóskandi høliskarmar at virka í. Hvar skúlin skal liggja er ikki avgerandi í hesum samanhanginum.**



Tað avgerandi er, at okkara skúli fær høli, har til ber at menna fakliga innihaldið í undirvísingini og at menna arbeiðshættirnar í undirvísingini, so teir fylgja við í námsfrøðiligu menningini innan okkara øki.

## Lokkandi skúli

Tað er avgerandi fyri meg, at næmingarnir í framtíðini kunnu mennast og trívast, og at til ber at skapa eitt arbeiðsumhvørvi fyri lærararnar, sum ger tað lokkandi hjá dugnaligum akademikarum at søkja sær arbeiði á skúlanum.

## Eldri lærarar

Komandi 10 árini fer meginparturin av verandi studentaskúlalærarum frá fyri aldur. Um studentsútbúgvingin skal varðveita og menna sítt støði, má skúlin vera minst líka áhugaverdur fyri komandi lærarar sum fyri komandi næmingar.

## Kunnu fáa fyrimunir

Tað kunnu skapast nógvir fyrimunir við, at studentaskúlin er partur av einum størri skúladepli.

Sum uppleggið er nú, skal depilin skipast við umfatandi integratión á leiðslustøðinum og í umsitingini, eins og samstarvað verður um nýtslu um fakhølum og felagshølum og um faklig tilboð, sum einstøku útbúgvingarnar ikki megna at lyfta einsamallar.

Men tær tríggjar verandi miðnámsútbúgvingarnar skulu varðveitast sum sjálvstøðug øki og menna sínar kjarnuførleikar sum slík.

## Ikki blanda alt saman

Tað vil siga, at í sjálvari undirvísingini er ikki ætlanin at integrera ella samanblanda verandi útbúgvingar. Á henda hátt hugsi eg, at vit fáa sum mest burtur úr styrkjunum hjá øllum trimum verandi skúlum. Vit varðveita og



menna verandi profilar, og samstarva har, ið samstarvið kann leggja nakað afturat.

## Mentanarligi profilurin

Her hevur tað fyri studentaskúlan stóran týdning, at tann sterki mentanarligi profilurin og tann sterka fakliga siðvenjan hjá skúlanum fylgja við og fáa rúmd í tí komandi deplinum – bæði í byggingini og í organisatiónini.

## Kraftsentur hjá ungdóminum

Tað liggja stórir og spennandi møguleikar opnir fyri okkum, nú teir tríggir skúlarnir í felag fáa høvi til at orða innihaldið og krøvini til komandi karmarnar í felag – og frá grundini av.

Við Miðnámsskúladeplinum ber til at skapa eitt fakligt, námsfrøðiligt og mentanarligt kraftsentur hjá ungdómininum í meginøkinum, um rætt verður borið at, t.v.s. at bygdir verða karmar, sum fremja fakliga menning og sosialan trivnað á skúlanum og lata upp fyri einum livandi felags- og mentanarumhvørvi uttan fyri sjálva undirvísingina.

## Karmar til 2/3 av øllum

Tað má havast sera frammaliga í huganum, at vit byggja karmar til umleið 2/3 av føroyskum miðnámsskúlanæmingum í framtíðini, t.v.s $^2/_3$ av tí partinum av føroyska ungdóminum, sum ætlanin er skal lyfta og fremja vitan sum ein framtíðar vinnuveg i Føroyum.

## Draga næmingar og lærarar

Tí hevur tað sera stóran týdning at skúladepilin bæði sum bygging og sum organisatión verður eitt stað, sum dregur næmingarnar til sín - og ikki minst verður eitt arbeiðspláss, sum dregur teir dugnaligastu og bestu lærarakreftirnar til sín.

## Tað ringasta, sum kann henda

Worst case scenario er, at byggingin verður avmarkað og niðurpínd við sparingum, og at depilin bygnaðarliga og námsfrøðiliga ikki verður skipaður við skili. Tá er vandi fyri, at hvørki næmingar ella lærarar fara at trívast har: At nógvir næmingar velja at fáa sær miðnámsútbúgving uttanlands, og teir bestu akademikarnir velja miðnámsskúlan frá sum arbeiðspláss. Og tá kann verkætlanin gerast ein kleppur um beinini á allari útbúgvingar- og granskinarmenning í Føroyum.

Men í skrivandi støðu talar alt fyri, at vit kunnu skapa ein dynamiskan og spennandi depil fyri miðnámsskúlaútbúgvingum og ungdómsmentan í Føroyum.

## Ongin nýbygging í 25 ár

Í Havn og í Suðurstreymoy hevur eingin nýbygging á miðnámsskúlaøkinum verið í 25 ár, samstundis sum verandi miðnámsskúlar í Havn umboða yvir 60% av miðnámsskúlanæmingunum í øllum landinum, so tað ber ikki til, at siga miðnámsskúladepilin seinkar nýbygging á miðnámsskúlaøkinum. Tað er rætt og slætt eingin onnur verkætlan á miðnámsskúlaøkinum, sum hevur størri týdning og er meira átrokandi enn hendan.

## Ítøkiligir fyrimunir

Teir ítøkiligu fyrimunirnir við at samla tríggjar skúlar í einum depli eru – ella eiga at vera, um miðsavningin ikki einans verður brúkt til sparingar-, at tú við at byggja í felag kanst fáa nøkur høli og nakrar karmar, ið tú annars ikki kundi fingið við at byggja tríggjar ymiskar skúlar.

Her hugsi eg t.d. um ítróttarhøll og uttandura ítróttarøki og um ein stóran sal við tøkniligari útgerð  til felags og almenn tiltøk, s.s. filmssýningar, konsertir, sjónleik, mótasýningar, fundir, ráðstevnur v.m.

## Í skrivandi løtu

Omanfyri nevndu fyrimunir eru ikki við í verkætlanini í skrivandi løtu, men tey eru partur av teimum ynskjum, sum studentaskúlin hevur til depilin.  Hyggja vit longur fram vil tað vera ein styrki, at tú fært eitt størri fakligt umhvørvi, betri møguleikar fyri yvirskipaðari námsfrøðiligari leiðslu og betri møguleikar fyri skipaðari og miðvísari fakligari menning av starvsfólkunum. Somuleiðis vil ein depil kunna bjóða fleiri og betri faklig tilboð.

## Kann gerast eitt afturstig

Tað er vandi í hvørjari vælferð. Tað nýtist ikki at vera ein vansi at savna hesar tríggjar skúlarnar í ein depil.  Men vit skulu ikki lata eyguni aftur fyri, at tað kunnu vera vansar.

Verður byggingin ikki nøktandi til at skapa góðar og mennandi fakligar, mentanarligar og sosialar karmar kring virksemið, og verða útbúgvingarnar rótaðar saman í ein fakligan greyt, har alt sær út sum eitt og sama tilboð fyri ungdóminum, ið skal søkja inn, samstundis sum verandi fakligu traditiónir og kjarnuførleikar fara fyri bakka, so verður úrslitið eitt stórt afturstig fyri miðnámsskúlan sum heild.

## 600-800 næmingar best

Einasti veruligi vansi, ið eg síggi við miðnámsskúladeplinum, er, at vit savna 1200 – og seinni helst enn fleiri- næmingar á einum stað. Gransking í skúlastøddum hevur víst, at 600-800 næmingar er besta støddin til miðnámsskúlar. Tá eru trivnaðurin og fakligi úrslitini best og fráfallið minst.

Tá tað er sagt, meti eg, at hesum vansanum kunnu vit byrgja upp fyri, um vit megna at skipa karmarnar, bygnaðin og undirvísingina, soleiðis at hædd verður tikin fyri trivnaðinum og persónligu og fakligu menningini hjá næmingunum.

Reidar Nónfjall stjóri á Føroya Handilsskúla:

# Skúlarnir eiga at varðveita sítt kjarnuvirksemi



Eg eri fyri, at Føroya Handilsskúli gerst partur av einum størri skúla. Tað hevur við sær eitt nógv meira mennandi og avbjóðandi lestrar- og arbeiðsumhvørvi.

Hetta er eitt stórt prosjekt eftir føroyskum viðurskiftum, men verður tað fyrireikað og planlagt professionelt, so er vandin fyri seinkingum minni.

Støðan er væl tann, at teir skúlar, sum talan er um at nýbyggja hava reelt ein tørv, sum má loysast akutt.

Hetta handlar um eina politiska raðfesting, sum er sakliga grundað. Talan er um einar 1.200 næmingar, sum hava tørv á nýskapan og menning innan frálæru, pedagogiska planlegging v.m.

Vit í Føroyum eru í kapping við onnur lond á hesum økinum. Hendir onki við nýbygging er vandi fyri, at næmingar fara til onnur lond at taka eina miðnámsútbúgving, og koma ongantíð aftur til Føroya.

Fyrimunirnir eru serliga, at vit fáa eitt lestrar- og arbeiðsumhvørvi, sum er við til at menna næmingin og lærarar. Harafturat verður skapt grundarlag fyri samstarvi millum fak o.a., sum næmingar ynskja, og sum t.d. kann vera grundarlag fyri framhaldandi lestri.

Aðrir fyrimunir eru, at íløgan gerst munandi lægri og vónandi eisini raksturin. Vit skulu bara hava eina kantinu og ikki 3 av hvørjum, so her er talan um felags funktiónir. Vit uppnáa við øðrum orðum nakrar stórrakstrarfyrimunir viðvíkjandi íløguni og rakstrinum.
Størsti vandin verður um skúlarnir fara at líkna ov nógv hvør øðrum. Skúlarnir eiga tí at varðveita sítt kjarnuvirksemi og harvið verða eksistensberattigaðir. Tí hava vit lagt upp til, at á tí operationella støðinum skulu tey 3 skúlavirksemini greitt skiljast at: tøkni, handill/merkantil og student/alment gymnasium.

Ein útbúgvingarleiðari verður settur at stýra á hvør sínum øki við referansu til ein fyrisitingarstjóra.

Hetta handlar eisini um at seta ein stjóra, sum skilir uppgávurna og kann leiða skúlan professionelt og eftir teimum intentiónum, sum lagdar verða.




mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo
SENDISTOVAN


FØROYA GASSØLA
Veitari av gasstøkni og útbúnaði
AGA
bp
ESAB
Føroya Gassøla • Akranesgøta 2 • Tórshavn • Tel 31 55 44, Fax 31 17 06


www.euronom.se
EURONOM
Hiti úr náttúruni
FlexiFuel er ein av heimsins bestu upphitingarskipanum til hús
Við FlexiFuel skipanini ber til at kombinera eina ella fleiri orkukeldur
Ársins Annlegg! Svenska Sólorku-felagið
ExoSol OPC
Vakumrør sólfangari. Ókeypis orku megin-partin av árinum! Nýggi vakumrørsólfangarin EU21 við innbygdum sólkyknum, framleiðir el til sirkulatiónspumpuna, sum sjálv regulerar maximumnýtsluna.
ExoAir
Rustfrí luft-/vatnpumpa. Gevur hita niður á - 25° og heitt vatn upp til +60°. Fekk gullheiðursløn á „Eneo Energie" størstu orkumessuni í Fraklandi í 2007.
ExoFlame
Brenniovnur, ið eisini kann bindast í tangan.
Exo Tangi VPS
Euronom Flexi Fuel er ein av heimsins bestu Agenda 21-upphitingarskipanum til hita í húsum. Hjartað í skipanini Exo Tank VPS, verður settur til sólfangarar, hitapumpur, oljufýr ella ta orkukeldu, mann frammanundan hevur. Við Flexi Fuel-skipanini kann mann velja at brúka ta upphitingarskipanina, sum mann ynskir, alt eftir hvat er bíligari.
Hiti
Alt rør og sanitet arbeiði verður gjørt
FlexiFuel
Stoffalág 33 · Tórshavn · tel. 315008 · fax 315009 · hiti@post.olivant.fo · www.hiti.fo
foroyaprent.fo


Gott handverk, skjót tænasta
Stephanssons Hús
SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo

alka

einføld trygging

ALKA - Engelholm Allé 1 - Høje Taastrup - 2630 Taastrup - Danmark

XL BYG Balslev.fo




www.balslev.fo

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92
Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




VARTA
THE BATTERY EXPERTS

Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir

POLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60

elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl

DELL HEWLETT PACKARD SONY Canon

# Meir enn bert ein telda




iMac hevur alt, sum ein telda skal hava, har dygd og vakurleiki semjast í einum ótrúliga lekkrum og hugvekjandi sniði. Við iMac verður smákeðiliga skriviborðið ein spennandi prýðislutur.

**12.490,-**

SENDISTOVAN

NEMA

city
www.city.fo

**Tórshavn** 347 300 • **Klaksvík** 347 310 • **Saltangará** 347 320

Birgir Kruse:

# Heimleys vitan

**“Hvat skal eg gera?” sigur lærarin ráðaleysur. “Tey eru sekstan ára gomul, vita alt um internetið, men duga ikki at halda einum blýanti. Hvat skal eg gera?” tekur lærarin uppaftur og suffar.**




Orðini fella í einari modernaðari skúlastovu fyri jól. Ein heilan fyrrapart hevur flokkurin við sjáldsamari fynd skift orð um teldutøkar miðlar, spøl og film. Næmingarnir eru sjáldsama væl fyri og duga at venda og snara hvørjum smáluti í filminum um Borat og telduspælinum World of Warcraft.

## Lurta ikki eftir tíðindum

Men tíðindi lurta tey ikki eftir. Lesa ikki bløðini og luttaka ikki í bókligu mentan skúlans. Meðan frægari er við gentunum, eru dreingirnir bókliga ómælandi. Mált eftir skúlans alin eru hesi ungu virðisleys, outcasts. Uttan at seta orð á støðuna, eru tey fullgreið um teirra skúlaliga ódugnaskap.

Ávegis til vitanarsamfelagið, eru tey heimleys. Skúlin gevur teim ikki innivist, tí hann dugir ikki at máta teirra førleika. Hann er ikki á nakrari tímatalvu, førleikin. Kann ikki setast inn í ein fýrakantaðan kassa, sum ein lærari kann máta, meta og viga.

Innan tey hava slept tvungnu skúlagongdini, hava tey longu sannført seg sjálvan um, at tað er ókul at vera klók.

## Útihýstir dreingir

Hyggja vit at dreingjum og teirra fragd at spæla ógvuslig telduspøl, síggja harðskapsfilm og lurta eftir heavy rokk, kunnu vit staðfesta at hesin dugnaskapur er útihýstur í dagsins skúla. Hóast tað er ásett við lóg, at skúlin skal taka støði í hinum einstaka næminginum.

Svenski granskarin Keith Roe vísir í bókini Våld från alla håll (Bokforlag Symposium 1993) at eitt tætt samband er millum at síggja nógvan harðskapsfilm, at vera úr arbeiðarastættini og at fáa javnt vánalig støðumet í skúlanum. At verða við í einum vinarskara, ið summi kalla banda, sum javnan hyggur at harðskapsfilmi, kann tí skiljast sum ein sjálvsverja, tá sjálvvirðið verða hótt ikki bara heima, men eisini í skúla.

Roe sigur, at dreingir úr arbeiðarastættini, sum saman við javnlíkum spæla nógv við teldu og hyggja nógv at filmi, sjáldan fáa høvi at vísa





teirra førleika í skúlanum. Hetta tí, at skúlin byggir á miðalstættina og hennara avmarkaðu hugsan um dannilsi, har spæl og leikur ikki tænir persónliga mennandi endamálum og tí eru útihýst, sigur hann.

## Lykilin til framtíðarsamfelagið

Undanfarna ár teknaðu PISA-fólkini eina vangamynd av føroyska skúlanum. Myndin avdúkaði so vánaligar førleikar, at vit kendu okkum sum sligin á nevið. Lukkutíð fór Skúlablaðið straks undir miðvísa tíðindatænastu og eydnaðist at seta skúlamál ovast á breddan í øllum miðlum.

Skúlin, har øll hava gingið og tískil altíð hava eina lógliga meining um, er sum aldri áður vorðin kjakevni. Rætt sum valutatíðindi, ið komu til, tá Sparikassin setti ein journalist í starv, so blivu skúlatíðindi ein natúrligur partur av almenna kjakinum, tá fólk varð sett at røkja hesa uppgávu. Men so hendi lítið meir. Uttan onkur smávegis játtan her og har, mest sum bara fyri at bøta um ringu samvitskuna hjá teim tinglimum, ið eisini eru lærarar og nú skulu hyggja foreldur í eyguni.

Tí børnini eru framtíðar politikkur og – kunnu vit illavorðin leggja afturat – púra opin fyri manipulasjón og inndoktrinering. Soleiðis eru korini fyri innlæring. Og ikki var tað uttan orsøk, at russar sum tað fyrsta eftir kollveltingina, løgdu seg eftir at hava ein góðan og væl skipaðan skúla. Tað var alt um at gera, tí har var lykilin til framtíðar samfelagið. Tilætlaðar samfelagsbroytingar eru bestar at fremja í uppalingini.



## Gott er, sum er

Nú er væl fráliðið síðani undankanning og hin veruliga PISA-kanningin komu fram. Men hvar eru politikaranir? Hví er eingin ætlan komin fram, hvussu vit bjarga okkum úr hesi óunnuligu støðu, har eingin bati hómast, men bara eitt illa útborðið barna- og ungdómslið? Hvør skal laga framtíðarsamfelagið, og leggja



lunnar undir Visjón 2015? Her hómast eingin ætlan, bert innantóm herðróp.
Grundandi yvir hesar spurningar, gerist eg meir og meir sannførdur um, at júst hetta er støðan, okkara fólkavaldu politikarar, har av nógvir eru lærarar, vilja hava okkum at støðast í og vera fegin um.

Eftir sum fólkavaldu løgtingslimirnir ikki vilja játta skúlanum tað, sum hann skjalpógvað hevur brúk fyri, so mugu vit ásanna at støðan, politiskt betraktað, er í fínasta lagi. Politiski viljin er at halda skúlan, har sum hann er. Ikki eitt vet betri, annarleiðis ella hægri. Men júst so sum hann er.

Tí skúlin staðfestir stættarsamfelagið. Tann førleika hevur eingin annar stovnur ella intriv, alment ella privat, í okkara samfelagi. Og við PISA-kanningini hevur Mentamálaráðið givið politisku skipanini ein leist at skera skúlan eftir.

Í øllum einfeldni, og sum um tað var ein vinnulig fyritøka, verður úrslitið í PISA sett sum nýtt ýti hjá politikarum. Boðskapurin skal vera einfaldur. Men teir gloyma, at tað er skúli ongantíð. Og við síni einfaldu hugsan um skúla, verður stættarbýti meitlað í forniskan stein. Soleiðis skal skúlin virka. Hann skal verða eitt amboð at varðveita stættarsamfelagið til ævigar tíðir.

Og so kunnu politikarar kropp á kroppi siga, at skúlin er sum ein supertankari, ið tekur drúgva tíð at venda. Drúgvari enn eitt valskeið. Tann tankin kostar so einki. Men ímeðan gongur tíðin. Og valskeið dettur av valskeiði.

## Klók børn klók foreldur

Øll varnaðust vit stóru yvirskriftina, at klók børn hava klók foreldur. Hetta er ein av stóru staðfestingunum í aktuellu PISA-kanningini. Restin av kanningini eru smámunir.

Felagsskapurin Heim og Skúli staðfesti longu á heysti 2006, at foreldur hava ein avgerandi leiklut fyri læringina hjá barninum. Men samstundis vísti felagsskapurin á nýggja gransking, sum staðfestir, at foreldranna týdningur sum lærarar fyri børnini, hvørvur ikki, tá tey byrja í skúla.

Umframt at samanhangur er millum dugnaligar næmingar og vælútbúgvin foreldur, vísir felagsskapurin eisini á ein størri samanhang, ið er millum dugnasemi hjá næminginum og møguleikarnar hjá barninum at samrøða við áhugað vaksin í heiminum.

Foreldrini – sum áður hava verið gjøgnum skúlaskipanina – hava altso størri týdning fyri læringina enn sjálvur skúlin. Og her er týdningarmikið at gera sær greitt, at næmingaavrik og dugnaskapur ganga báðar vegir. Bæði upp og niður. Sosiali arvurin er tungur at bera og verri at bróta.

## Bleyt virði, WTF?

Ofta verður sagt at skúli og uppfostran eru tey bleytu virðini. Tey virði, sum kvinnur og kventlar fáast við. Hin virðini eru tey týdningarmeiru, tey, sum rættir menn við stirðili fáast við á Tingi og úti millum manna.

Í veruleikanum er tað beint øvut. Samfe-

lagsbroytingar verða bara framdar í uppalingini. Tí har er lykilin til framtíðar samfelagið. Innan Tinggátt og úti í føroyska veiðimannasamfelagnum, hava menn ikki fangað hetta.

Men longu annan dagin í nýggja árinum eru tvær kvinnur, sum á skilagóðum støði viðgera skúlaviðurskifti í bløðunum. Til fánýtis ætlaðu tær sær inn á Ting. Og komu tær inn hevði verið trupult hjá teimum at sannført allar floksformenn, at eitt stættarstríð yvirhøvur er til. Tí við støði í nýggjársrøðu løgmans, tileinkisger eini floksformaður í sama blaði alla hugsan um stættarstríð. Tað verður stríðið so ikki minni av.

## Sløkk og kvett!

Hvat skal ráðaleysi lærarin gera og hvussu eigur skúlin at lofta hesum bleiku, svartklæddu dreingjum og gentum, sum bert tykjast finna fragd í sigarettroyki, dundrandi heavy rokki, telduspæli og blóðdryppandi filmi?

Sannleikin er, at hesi ungu eru millum tey fáu, ið vísa vegin til vitanarsamfelagið. Men tey eru so marginaliseraði í okkara samfelagi at lívæðrin, internetveitarar, vilja ikki vita av teimum. Bløðini upplýsa at lógliga flat-rate haldið hjá teimum fyri túsund krónur um mánaðin verður ógildað, tí tey taka so nógv til sín. Eg meini tað.

“Veruleikin er tann, at við bert at læra ungdómin hesi (red: bókligu) tingini, so læra vit tey at gerast borgarar í einum samfelag, sum var til fyri nógvum árum síðani,” segði eitt skilagott, ungt valevni. Sjálvur er hann skúlanæmingur á trettanda ári.

“Vit læra tey ikki at gerast virknar borgarar í samfelagnum, sum tey koma út í aftaná loknan lesnað. Orsøkin er sera einføld. Generella hugsanin er, at margmiðlar eru nakað tvætl, og teir skulu beinast burtur, so skjótt komið er inn um skúladyr. Sløkk fartelefonina, lat farteldunа aftur og fylg við og so framvegis,” sigur unga valevnið um dagligu skúlagongdina í 2008. Heldur ikki hetta valevnið kom á Ting.

## Svensk kanning

Svenska Ungdómsráðið kunngjørdi fyri jól eina kanning av 2900 ungum svium millum 16 og 25 ár. Heitið er Unga och netvärkskulturar – mellan moralpanikk och teknikromatik.*)

At spæla á teldu er nýggj atferð, íkomin seinastu fjórðingsøld. Sjey av tíggju svenskum ungdómum siga seg spæla telduspøl. Trý av tíggju gera tað hvørja viku ella oftari, og dreingir spæla meir enn gentur. “I kanningini síggja vit, at ung, sum spæla telduspøl, drekka minni rúsdrekka, kenna seg ikki so strongd og dyrka ítrótt á sama støði sum onnur javnaldrandi,” sigur Per Nilsson, stjóri í Ungdómsráðnum.

Kanningin avdúkar eisini at tað eru ikki bara børn og tannáringar, ið spæla á teldu. Fimti hvør 25 ára gamal svii spælir teldu minst eina ferð um vikuna.



# Bíligari Betri Beinleiðis

Endamál felagsins er at kunna selja eina fyrstafloks vøru til ein bíligan penga!

import.fo



**Klædningurrin frá okkum er viðlíkahaldsfríur og hevur allar teir fyrimunirnir, sum træi hevur, men uttan vansarnar – sum gjørdur til føroyska veðurlagið!**

Vit kunna bjóða vindeygu og hurðar framleid úr plast, træ, mahogny, eik og alu-træ. Vit hava, stutt sagt: »vindeygu, tær tørvar, fyri prís, tú ynskir!« Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki er standard.



Viðlíkahaldsfríur klædningur · Hurðar · Vindeygu

Skotarók 3 · Box 3070 · FO-110 Tórshavn · tel: 321 521 · import@import.fo · www.import.fo



# Tú ert handverkarin!

... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín

Vit kunnu bjóða
- spennandi arbeiðsuppgávur
- ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
- starvsfólkamenning
- trivnað

Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv

SENDISTOVAN

LM ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice

**Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20**

Tú og e – vinna hvørja ferð!




Eik Banki P/F er e kortútgevari

www.ekort.fo

BAXI KETIL



BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001 góðkendir.

Við kappa til oljufýr

Ein tann mest orkusparandi ketil á føroyska marknaðinum.

Síggj kanningina á www.sparolie.dk

**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

**Vágur:**
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65



demich



Í eina kapitlinum Datorspelande som bildning och kultur skrivar Carin Falkner, doktari á lærda háskúlanum í Örebro, um teir námsfrøðiligu møguleikarnar í spæli. Eftir at hava kannað ung og teirra telduspæl í tvey ár, endar hon greinina við hesum skaldabornu orðum:

"Í telduspæli síggi eg tað nælandi fræið, ið verður til ein heimsborgara, ella eina mentaða cyborg. Men at fáa hetta fræið at standa í vøkstri, krevst ein námsfrøðiligur samanhangur, ið bæði tekur subjektivu og objektivu útbúgvingina við, og sum megnar at skoða út um hesi bæði, við í fyrsta lagi at brúka royndirnar hjá teim, sum brúka telduspøl og í øðrum lagi at geva hesum førleikanum fremmandar avbjóðingar. At lærarar og næmingar í felag lata upp fyri tí, sum tykist hvørjum øðrum fremmant og á henda hátt fáa høvi at tulka og læra seg betur at skilja. At lata sum einki og enntá vísa telduspæli burtur úr skúlanum er at køva nælandi fræið." (bls. 45).



## Rannsókn í gaddajørð?

Ofta verður sagt, at Føroyar eru ein rannsóknarstova, tað verði seg innan veður og vind, máliskur ella arvaeginleikar.

Hyggja vit í aðalmálini í Visjón 2015, síggja vit bjartar vónir um at Føroyar verða fyrimynd í alheimssamfelagnum, at vit fara at eiga vælvirkandi skipanir, ið borga fyri dygd og nýskipan og at mentan og list verða týðandi partar av okkara samfelagsbúskapi.

Ungdómurin, ið skapar framtíðina, er so ikki tikin við uppá ráð. Tað ungdómliga fræðið, ið fær vitanarsamfelagið at næla, er fallið í gaddajørð. Men kanska er vón fyri framman. Ein nývaldur landstýrismaður segði fyri jól, at "Vit mugu flyta okkum sum fólk og land nógv nærri einum vitanarsamfelagi." So satt, so satt. Men hann hevur longu lagt frá sær og er farin aftur til kommunala starvið, hann kom frá.

Síðani hevur nýggj samgonga tikið við, og kvinnur eru settar at leiða mentamál og kringvarp. Gævið, at teimum hepnast at flyta okkum longur fram á leið, so vit koma úr teirri naggatódn, sum skúli og miðlar eru komin í.

*) Svenska frágreiðingin kann takast ókeypis niður av heimasíðuni www.ungdomsstyrelsen.se

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

- ✓ Handverksútbúgvingar
- ✓ Støðisútbúgving
- ✓ Yrkisakademiútbúgvingar
- ✓ Skúlaheim



Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051

www.tst.fo • tst@tst.fo



# Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

www.sansir.fo

# Saman við okkum røkkur tú longri

FØROYABANKI

Sum hollur viðleikari í vinnulívinum hevur Føroya Banki kunnleika og kapasitet til at fremja møguleikarnar í tíni fyritøku.

Í 100 ár hevur Føroya Banki vegleitt og fíggjað føroyskt vinnulív í góðum sum ringum. Hesa tíðina hava Føroyar verið fyri ovurstórari menning, og vit tora at siga, at Føroya Banki hevur verið ein týðandi partur av gongdini. Hesi 100 árini hava lært okkum nógv, og vit eru klár til meira.

www.foroya.fo

SENDISTOVAN